# Miðflokkurin hevur álit á løgmanni

**Anfinn Kallsberg nýtist ikki at bera ótta fyri, at Miðflokkurin fer at taka undir við einum misáliti á løgmann. Flokkurin sigur tvørturímóti, at Anfinn Kallsberg er ein virðiligur løgmaður**

LØGMANSNOTATIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Anfinn Kallsberg nýtist als ikki at bera ótta fyri, at Miðflokkurin fer at reisa misálit á hann. Jenis av Rana sigur, at Miðflokkurin framvegis hevur fult álit á løgmanni, sum er ein virðiligur løgmaður fyri Føroya land*
*Mynd: Savnsmynd*

Anfinn Kallsberg í dag, er ikki Anfinn Kallsberg fyri 25 árum síðan. Hetta er ein av niðurstøðunum, sum Miðflokkurin er komin til, eftir at hava lisið bókina, Skjót journalistin.

– Bókin um fortíðina hjá løgmanni gevur mær einki nýtt. Eg eri fullkomiliga samdur við løgmanni, at málið um fortíðina á Frostvirkinum varð avgreitt, tá sonevnda notatið varð undirskrivað. Hann gjørdi nakað galið tá, og málið varð avsluttað við notatinum, sum allir involveraðir partar undirskrivaðu, sigur Jenis av Rana.

### Ongar avleiðingar

Løgtingsmaðurin hjá Miðflokkinum sigur, at flokkurin hevur tosað saman innanhýsis um málið, og er komin fram til, at bókin eigur ikki at hava nakrar avleiðingar fyri løgmann. Spurningurin um at taka undir við einum møguligum misáliti á løgmann, kemur slettis ikki upp á tal, sigur Jenis av Rana.

– Tann Anfinn, vit kenna í dag, hava vit fult álit á. Vit hava góðar royndir við honum sum løgmanni, og eg haldi at Føroyar hava ein virðiligan løgmann, sigur tingmaðurin hjá Miðflokkinumm.

### Skilir ikki Fólkaflokkin

Jenis av Rana sigur seg ikki skilja, hví tingbólkurin hjá Fólkaflokkinum skuldi leika so nógv í fyri góðari viku síðan, tí bókin kemur eftir hansara tykki ikki fram við serliga nógvum nýggjum avdúkingum. – Er tað nakar sum hevur ein trupulleika í dag, so er tað tingbólkurin hjá Fólkaflokkinum. Teir skaptu óneyðugu stóra øsing um málið, heldur Jenis av Rana.

Jenis greiðir frá, at hann fyri langari tíð, síðan hevur spurt seg fyri um fortíðina hjá løgmanni, og avdúkingarnar í bókini, Skjót journalistin, eru ikki nakað, sum hann ikki visti frammanundan.

### Hjartasuff

Tingmaðurin hjá Miðflokkinum hevur eitt hjartasuff vent ímóti báðum journalistunum, Grækarisi Magnussen og Øssuri Winthereig. Hann heldur, at ein týdningarmikil smálutur manglar í bókini. Hann hevði kunnað hugsað sær, at rithøvundarnar kundu greitt nærmari frá, um Anfinn Kallsberg, sum bókhaldari á Frostvirkinum, flutti sær sjálvum pening við persónligum vinningi fyri eyga ella ikki.

– Í hesum tíðum, har vit hava hoyrt nógv um Arctic Viking og útgjald av vinningsbýti, hevði eg gott tonkt mær at fingið at vita um Anfinn rindaði sær sjálvum pening. Eg vænti, at rithøvundarnir hava kannað spurningin og funnið fram til, at so ikki var. Eg haldi bara at teir kundu nevnt tað í bókin. Tað er bara eitt kritikkpunkt frá mær um, at arbeiðið í hesum førum ikki er nóg gott gjørt, sigur Jenis av Rana.

# Andstøðan bíðar

**Bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin bíða eftir, hvørja støðu samgongufelagirnir hjá Fólkaflokkinum fara at taka til málið um fortíðina hjá løgmanni. Andstøðuflokkarnir skuldu hava fund um málið, áðrenn tingfundin í gjár**

LØGMANSNOTATIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á middegi í gjár høvdu bæði Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum fund um fortíðina hjá løgmanni. Báðir flokkarnar skuldu umrøða, hvørja støðu flokkarnir skulu hava í málinum, og hvørji átøk skulu gerast. Andstøðan hevði, stutt undan blaðið fór til prentingar, ikki tosað nærmari saman um eina felags støðu í málinum.

### Í bíðistøðu

Bæði formaðurin í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen og í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, siga, at sum støðan er í løtuni, so er andstøðan í bíðistøðu. Báðir andstøðuleiðararnir eru á einum máli um, at spurningurin um hvørjar politiskar avleiðingar fortíðin hjá løgmanni eigur at fáa, liggur í løtuni hjá samgonguni.

– Fyrst má løgmaður koma til eina niðurstøðu, sum hann eftir øllum at døma hevur gjørt. Síðan er tað flokkurin hjá løgmanni, og í triðja føri eru tað samgongufelagirnir hjá løgmanni, ið mugu gera av, um nakað skal gerast í málinum. Nústaðni tá, stendur andstøðan fyri tørni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Andstøðuflokkarnir hava ikki umrøtt møguleikan fyri einum misáliti enn, og ein felags støða verður ikki tikin í málinum fyrr, enn tað gerst greitt, hvat samgonguflokkarnar ætla at gera við málið

### Spentur

Í samband við málið um Jørgen Niclasen, valdi andstøðan at seta eitt misálit fram. Við misálitunum trýsti andstøðan serliga Tjóðveldisflokkin at taka støðu í málinum, og úrslitið varð, at Tjóðveldisflokkurin tók undir misálitinum við andstøðuni.

*Kunnu vit vænta okkum eina endurtøku?*

Tað dugi eg ikki at siga, tí vit hava framvegis ikki tosað við Sambandsflokkin, so tað er ilt at meta um í núverandi støðu, sigur Jóannes Eidesgaard

Persónliga sigur hann seg verða ómetaligan spentan, hvørja støðu Tjóðveldisflokkurin fer at taka í málinum. – Málið er ein samanblanding av makt og morali, og tað verður spennandi at síggja hvørja síðu, Tjóðveldisflokkurin fer at taka. Hvat væntar tú? Satt at siga, so veit ikki, hvat Tjóðveldisflokkurin kemur fram til, sigur formaðurin í Javnaðarflokkurin.



*Báðir andstøðuflokkarnar skuldu hava fund um fortíðina hjá løgmanni í gjár. Bæði forkvinnan í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen og formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, eru á einum máli um, at bólturin liggur í løtuni hjá samgonguni, og hon má finna út av, hvussu farast skal fram í málinum, áðrenn andstøðan kemur upp í leikin*
*Mynd: savnsmynd*

### Skaðað umdømið

Forkvinnan í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen, dregur somu línu sum formaðurin í Javnaðarflokkinum. Sambandsflokkurin skuldi umrøða avdúkingarnar í bókini, Skjót journalistin, á innanhýsis fundi í gjár, har flokkurin skuldi finna fram til eina felags støðu til málið.

– Persónliga haldi eg, at tað er óforsvarligt at hava ein løgmann sitandi við hasari fortíðini. Stóri trupulleikin liggur nú hjá Fólkaflokkinum og samgonguni. Velur samgongan einki at gera, so má andstøðan umhugsað sína støðu, greiðir Lisbeth L. Petersen frá.

Hon heldur at málið um fortíðina hjá løgmanni ger alt annað enn at pynta um umdømið hjá føroyingum uttanlands, og málið er enn ein stór riva í umdømið hjá føroyingum.



# Grannskoðarar fjala brotsverk

**Sjálvt um eitt grannskoðaravirkið kemur fram á eitt brotsverk, so hevur tað ikki skyldu at boða myndugleikunum frá. Er talan um eitt størri fíggjarligt brostverk, so eigur leiðslan at melda. Tað átti helst at hent í dømum sum tí, tá ið Anfinn Kallsberg var bókhaldari á Frostvirkinum í Norðdepli, heldur Niels Ebbe Andersen, fakstjóri hjá FSR, statsautoriseraðum grannskoðarum í Danmark**

LØGMANSNOTATIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



Tórshavn, hin 9. januar 1984
C.V. Weihe
statsaut. revisor
A. Absalonsen
reg. revisor

*Úr bókini »Skjót journalistin«. Notatið, sum bjargaði Anfinn Kallsberg undan geglinum, var orðað á undirskrivað á skrivstovuni hjá grannskoðaravirkinum Carl Vilhelm Weihe.*

Tagnarskyldan er heilag. Hon gongur so langt, at hon eisini gongur út upp á káva útyvir økonomiskan kriminalitet, um tað er neyðugt.

Tað vísir málið um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg, tá ið hann var bókhaldari á Frostvirkinum í Norðdepli.

Anfinn Kallsberg var eftir øllum at døma fangaður í skjalafalsan, vísir bókin »Skjót journalistin«, sum kom út mánadagin. Hann hækkaði virðið á goymsluni við at broyta tøl á goymslulistanum, og gjørdi síðan flytingar til feløg, sum hann var reiðari fyri. Upphæddin var 912.000 krónur árini frá 1977-81, vístu kanningar, sum grannskoðaravirkið Carl Vilhelm Weihe stóð fyri.

Kortini slapp Anfinn Kallsberg, sum tá var vorðin landsstýrismaður, undan at fara í geglið, tí ein semja varð gjørd. Hon bygdi á eitt notat, sum grannskoðaravirkið hevði latið gjørt.

### Úr saksinum

Grannskoðarar staðfesta varliga í skjalinum, at »feilir hava verið í roknskapinum 1977-81«. Semjan ber í sær, at Anfinn Kallsberg skal gjalda tær 912.000 krónurnar aftur til Frostvirkið. Afturfyri verður bókhaldarin ikki meldaður, stendur í bókini »Skjót journalistin«.

Sostatt var tað við hjálp frá Grannskoðaravirkinum, at Anfinn Kallsberg slapp úr saksinum. Claus Rasmussen, stjóri á Rasmussen&Weihe, sum grannskoðaravirkið nú eitur, hevur onga viðmerking til málið. Hann sigur bara, at tagnarskyldan hjá grannskoðaraum gongur langt. Rættiliga langt. Og tað er eisini orsøkin, at hann einki vil siga um málið, tí so kann tað vera tulkað soleiðis, at hann brýtir tagnarskylduna.

### Stendur til nevndina

Fakstjórin í felagnum hjá statsautoriseraðum grannskoðarum í Danmark, Niels Ebbe Andersen, sigur eisini, at grannskoðarar hava tagnarskyldu.

– Grannskoðarar hava ikki fráboðanarskyldu. Og als ikki fyri 20 árum síðan. Nýggjar reglur eru komnar í gildi í Danmark, sum áseta, at grannnskoðarin skal gera nakað. Hatta málið ljóðar sum vanligt tjóvarí. Tað áliggur granskoðaranum at boða nevndini frá brotsgerðini, og so er tað upp til hennara, um tað skal meldast, sigur Niels Ebbe Andersen.

Virki vilja sjáldan koma undir sjóneykuna hjá pressuni. Tað kann geva vánaligt umdømi, og tí vil nevndin gera alt fyri at klára málið innanhýsis, greiður Niels Ebbe Andersen frá. Hann heldur kortini fyri, at eitt mark eigur at vera.

– Tá talan er um munandi upphæddir, so eigur nevndarformaðurin kortini at melda málið. Ein millión fyri 20 árum síðan er ein stór upphædd, og tí átti nevndin helst at havt meldað, sigur Niels Ebbe Andersen.

Niels Pauli Danielsen var nevndarformaður, tá ið málið fór fram. Umframt hann hava Carl Vilhelm Weihe, statsgóðkendur grannskoðari, Árni Absalonsen, grannskoðari, Absalon í Buð, nevndarlimur, og Anfinn Kallsberg sjálvur undirskrivað notatið.

### Á stakroyndir

Anfinn Kallsberg var vorðin landsstýrismaður, tá ið semjan varð undirskrivað, og tað kann vera ein orsøk, at hann kláraði frísak. Tað er ein politiskur spurningur, sum Niels Ebbe Andersen ikki vil meta um.

Hinvegin kann eisini vera, at grannskoðaravirkið vildi sleppa undan, at tað kom fram, at grannskoðarin ikki hevði varnast, at goymslan var fiktiva stór. Tað vil Claus Rasmussen, stjóri á Rasmussen&Weihe, als einki viðmerkja til.

Niels Ebbe Andersen sigur, at tað sjálvandi er skyldan hjá grannskoðaranum at hava eftirlit við, um goymslutølini samsvara við veruleikan, men hann leggur dent á, at tað sjáldan byggir á 100% uppteljing. Talan er um stakroyndir, ið verða tiknar, og tí kann grannskoðaravirkið neyvan lastast.

# Fólkaflokkurin kennir seg tryggan

**Fólkaflokkurin óttast einki misálit. Tjóðveldisflokkurin fer neyvan at avreiða landsins leiðslu til Sambandsflokkin, nú listar av yvirtøkum liggja á borðinum, sigur Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum**

MISÁLIT
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er »business as usual« hjá Fólkaflokkinum, eftir at bókin »Skjót journalistin« kom út mánadagin. Tað vil formaðurin í tingbólkinum Óli Breckmann í øllum førum vera við.

Bókin leggur formann floksins, Anfinn Kallsberg løgmann, undir skjalafalsan og sum bókhaldari á Frostvirkinum hava flutt 912.000 krónur til sítt egna virki, sum virkið onki átti í.

– Eg havi ikki lisið bókina og ætli mær heldur ikki at lesa hana. Eg veit nøkunlunda, hvat hon umtalar, og tað er farið. Fólkaflokkurin ger heldur ikki meira við málið. Ærumeiðing er eitt persónligt mál. Tað veldst um, hvussu hátíðarligt tú tekur tað, tá tú verður viðgjørdur persónliga. Vit hava einki at gera við eitt ærumeiðingarmál, hóast tað kanska er tilfar til tað í bókini, sigur Óli Breckmann.

Løgmaður hevur longu fleiri ferðir sagt, at hann ongar ætlanir hevur um at leggja frá sær, og Óli Breckmann ger eisini púra greitt, at teir onga orsøk síggja til at skriva út nýval.

– Fólkaflokkurin hevur høg mál og vit ganga út frá, at okkara samstarvsflokkar fara at taka politisku uppgávuna líka álvarsliga, sigur Óli Breckmann við greiðari tilvísing til Tjóðveldisflokkin.

Spurningurin er, hvat Tjóðveldisflokkurin ger næstu dagarnar. Ger hann einki er hugsandi, at andstøðan leggur fram misálit á løgmann. Tað hevur Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum sagt seg hava hug til. Skal tað vinna frama, mugu 17 tingmenn atkvøða fyri, og tá vera øll eygu vend ímóti Tjóðveldisflokkinum.

– Eg óttist einki misálit. Sjálvstýrishugurin má viga nokk so tungt. Vit hava sitið í hálvt annað ár í hesi samgonguni. Tjóðveldisflokkurin hevur akkurát lagt ein lista fram av málum, sum skulu yvirtakast, so hann fer neyvan at avreiða landsins leiðslu í hendurnar á Sambandsflokkinum. So kunnu tey halda seg vera so rein og sæl, sum tey vilja, sigur Óli Breckmann argandi.

Tjóðveldisflokkurin sat á fundi allan fyrrapartin týsdagin, og tí bar okkum ikki til at fáa uppspurt, hvørja støðu flokkurin hevur, nú fólk hava lisið bókina. Regluligi landsstýrisfundurin, sum er í Tinganesi hvønn týsdag, var eisini avlýstur, so tað er eingin ivi um, at endurfødda málið um fortíð løgmans verður mett álvarsligt í samgonguni.